## OPEC skerjir ikki

Felagsskapurin hjá oljuútflytaralondunum, OPEC, fer at varðveita verandi dagligu oljuframleiðsluna. Londini ásanna, at ov nógv olja er á altjóða marknaðinum, men havandi í huga, at altjóða samfelagið er í kreppu, eru OPEC-londini samd um at halda fram við verandi framleiðslu. Eygleiðarar siga, at avgerðin hjá OPEC merkir, at oljuprísurin fer framhaldandi at liggja um einar 70 dollarar fyri tunnuna, skrivar DR á heimasíðu síni. Fyri einum góðum ári síðani, í juli í fjør, kostaði oljan 147 dollarar fyri tunnuna.



## Evropa styðjar Obama

Barack Obama er framvegis sera væl umtóktur hesumegin Atlantshavið. Í einari kanning, sum bleiv gjørd í juli, svaraðu næstan 80 prosent av teimum spurdu evropearunum, at tey styðja amerikanska forsetan. Kanningin vísti, at hann er serliga væl umtóktur í Vesturevropa. Her søgdu 86 prosent seg styðja hann og politikk hansara, meðan 60 prosent av teimum spurdu mið- og eysturevropearunum søgdu tað sama. 77 prosent av evropearunum styðja uttanríkispolitikkin hjá Obama. Til sammetingar kann nevnast, at á tí økinum fekk George W. Bush stuðul frá 19 prosentum í Evropa.

Vælferðarføroyar í fillum:

# Betal ella bíða

**Tað var ein herskin biti at svølgja, tá 81 ára gamla Anna Skæling skuldi hava nýtt hoyritól. Hon mátti velja millum at standa á einum langum bíðilista ella gjalda út við 5000 krónur, skuldi hon hava tað nú**

SPARINGAR
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*



*- Tak nú bara lønina hjá løgtings- og landsstýrismonnum. Hana røra teir ikki, men í staðin leggja teir eftir okkum gomlu. Tað er ólukksáliga óreint at vit gomlu, sum bara hava fólkapensjónina at liva av, skulu verða harðast rakt, siga ávikavist 81 og 91 ára gomlu Anna Skæling og Folmer Jørgensen*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Tvinnir eru kostirnir, hvørgin er mjúkur. Tað mátti 81 ára gamla Anna Skæling av Signabø sanna, tá hon herfyri skuldi hava nýtt hoyritól.

Hon hevði í nógv ár havt eitt hoyritól, men nú var hoyrnin versnað somikið, at hon noyddist at fáa sær eitt nýtt. Hon fer til Hoyriklinikkina á Landssjúkrahúsinum, og fær at vita, at hon kann verða skrivað upp á bíðilistan har, ella at hon kann fara til privatu hoyriklinikkina »Hoyrnin«, har eingin bíðilisti er. Tað er tó við eini treyt. Velur hon at fara til »Hoyrnina«, verður stuðul bert veittur upp til 6000 krónur.

- Tað, sum tá manglar í, mátti eg gjalda sjálv, greiðir Anna Skæling frá.

Tá Anna hevur verið hjá Hoyrnini og hevur fingið gjørt tær kanningar, sum skulu gerast, er úrslitið greitt. Hon skal hava eitt nýtt hoyritól, ið kostar 11.900 krónur. Sostatt noyddist hon at gjalda heilar 4.900 krónur sjálv, meðan almenni stuðulin var 6000 krónur.

- Hetta haldi eg er for galið. Tá eg í 2002 fekk staðfest Méniéres sjúkuna, ið er eitt órógv á innara oyranum, sum ávirkar hoyrnina og balansuna, fekk eg eitt fínt hoyritól, sum eg haldi kostaði einar 12.000 krónur, og tá var gjørligt at fáa alt endurgoldið frá landinum. Men soleiðis er ikki nú, vísir Anna á.

Orsøkin til at stuðul bert verður veittur upp til 6000 krónur til hoyritól, er ein kunngerð, ið Rósa Samuelsen, landsstýriskvinna í Almannamálum, setti í gildi tann 1. Januar í ár.

Í kunngerðini stendur: »§ 4. Umsøkjari, sum er 18 ár ella eldri, ið velur at nýta góðkendan privatan veitara av hoyritólum, kann í staðin søkja um stuðul frá Hoyriklinikkini á Landssjúkrahúsinum til keyp av hoyritóli sbrt. § 2, stk. 1. Stuðulin er í mesta lagi 6.000 kr. fyri hvørt hoyritólið. «

### Sparingarnar líkjast ongum

Fyri eitt eldri par, ið livir av fólkapensjónini, kann ein slík útreiðsla vera tung at bera.

- Men tað klára vit hóast alt, sigur Anna.

Tó verður byrðan tung, tá útreiðslurnar raka á fleiri økjum í senn. Folmer Jørgensen, ið er 91 ára gamal, hevur eisini ymiskt at dragast við á gamalsaldrinum. Hann hevur diabetes og tekur hjartamedisin.

Tá tey fyri kortum skuldu hava heilivágin, var tað eisini ein størri rokning, tey fingu í hondina. Áður hava tey goldið tær fyrstu 600 krónurnar um kvartalið, men tá tey hesaferð fóru eftir heiliváginum, var rokningin upp á 1700 krónur.

- Det er jo helt over skyerne, sigur Folmer.

Harafturat hevði rokningin verið uppaftur størri, hevði kommunulæknin, Steen Larsen, ikki ansað eftir, og givið Folmer eitt bíligari hjartamedisin.

- So hevði rokningin verið omanfyri 2000 krónur, sigur Anna.

### Ólukksáliga óreint

Anna og Folmer eru alt annað enn fegin um tær sparingar, ið verða gjørdar í hesum døgum. Tey eru á einum máli um, at sparingarnar verða framdar í skeivum stað.

- Tak nú bara lønina hjá løgtings- og landsstýrismonnum. Hana røra teir ikki, men í staðin leggja teir eftir okkum gomlu. Tað er ólukksáliga óreint at vit gomlu, sum bara hava fólkapensjónina at liva av, skulu verða harðast rakt, siga tey bæði.

Tá tey nú skulu hava bæði nýtt hoyritól og heilivág, umframt allar tær vanligu útreiðslurnar við el, olju, mati og annað, so verður tað tilsamans ein stór útreiðsla.

- Og so er tað eisini hatta kringvarpsgjaldið, sum er upp á 1800 krónur, sum akkurát er komið inn um dyrnar, vísir Folmer at enda á.

# Sparingin er skilagóð

**Jutta Helgadóttir, sum eigur og rekur privatu klinikkina »Hoyrnin« er ikki samd í, at hetta er ein skilaleys sparing. – Tvørturímóti, heldur hon**

SPARING
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Jutta Helgadóttir er ósamd í, at kunngerðin um, at stuðul bert verður veittur upp til 6000 krónur.

Brúkarin søkir um stuðul, og rindar munin millum stuðulin og tað hoyritólið kostar. Ynskir brúkarin okkurt meir avansera hoyritól ella eykaútgerð til hoyritólið hækkar brúkaragjaldi tilsvarandi.

- Fólk hava tikið sera væl ímóti hesi skipan, og eg haldi at tað ikki er meir enn rímiligt at tey rinda ein part sjálvi, um ein ynskir tað, sigur Jutta Helgadóttir.

- Ískoytið dekkar eitt vanlig tól - altso tær mest neyðugu funktiónirnar. Eg haldi at man skal vera nøgdur við at man fær ískoytið helst í hesum tíðum, hvar tað verður spart allastaðni, greiðir hon frá.

### Hvat rindar tú fyri?

Jutta greiðir frá, at tað, sum tú rindar fyri, er nógv meira enn bara hoyritólið.

- Tú hevur møguleika at royna tólið í 14 dagar, áðrenn tú tekur eina avgerð. Tú rindar fyri tólið - 4 ára garanti og 4 ár fríða tænastu. Tú kann koma til eina og hvørja tíð og stilla uppá tólið alt tað fylgir við í prísinum. Tað vil siga at man skal strekkja upphæddina yvir 4 ár. Er tað nakað ein hevur brúk fyri tá man er hoyritólabrúkari, so er tað at fáa tænastu tá man hevur tørv á tí.

### Jalig ávirkan

Jutta heldur sjálv, at tað hevur bara haft positiva ávirkan at henda lógin er komin í gildið. Hon greiðir frá, at tað at brúkarin nú sjálvur rindar ein part av kostnaðinum fyri hoyritólini, er við til at broyta hugburðin hjá brúkaranum tann rætta vegin.

- Nú tekur brúkarin størri ábyrgd fyri tólinum og stillar hægri krøv til tænastuna. Tað at brúkarin nú rindar fyri tað vøru og tænastu, hann áður fekk ókeypis, ger, at brúkarin kemur aftur og aftur til hann er nøgdur, og síðst, men ikki minst ansar betur eftir tólinum, hann nú hevur ogna sær, greiðir Jutta Helgadóttir frá.